# Námsfrøði undir opnum himni

*Í Klaksvík verður dúgliga granskað. Tvey útlendsk námsfrøðislesandi eru komin í Borðoynna at eygleiða útibarnagarðin, Útistovu*



*Norsku Ann Helen (vm) og Anette skulu gera kanningar í Útistovu í tvær vikur. Síðani fara tær kring oyggjarnar í aðrar tvær.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Útistovubørn og vaksin við Gravará við uppbrotnum ermum í január.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

HØGNI MOHR

Norðmenn hava áhuga í føroyskari námsfrøði. Í hesum døgum eru tveir námsfrøðislesandi norðmenn í Klaksvík og eygleiða og avmynda gerandisdagin á barnagarðinum, Útistovu á Norðoyri.

Tær báðar, Anette úr Kongsberg og Ann Helen úr Molde í Noreg, hava valt sær útibarnagarðsumhvørvið sum próvtøkuætlan. Í hesum sambandi hava tey, umframt eygleiðingarnar í føroyska ansingarumhvørvinum, kannað samsvarandi stovn í Noreg.

**Stórt spælipláss**

Børnini í Uppistovu hava ikki plásstrupulleikar. Úti í grøv á Norðoyri halda børnini í Uppistovu til. Stovnurin hevur støði í húsum hjá KFUM-skótunum í Klaksvík, men er deild undir kommunala ansingarstovninum í Klaksvík, Mylnustovu.

Úr fjørðuni í Borðoyarvík og upp undir hamaran á Høguhædd gongur dagurin hjá teimum 14 reyðdæmdu børnunum. Leiðarin, Annie Joensen, námsfrøðingur og Vivi Johannesen, hjálpari lata væl at.

- Okkara spælipláss er fjørðan, hagin og áin, sigur Annie og peikar út móti ánnið, ið rennur beint uttan fyri Útistovu.

**Frælsari í Føroyum**

Norsku gestirnir, ið granska føroyska barnaansing undir opnum himni, tykjast bergtiknir av ansingarskipanini í Klaksvík.

- Tað er hugtakandi at síggja hvussu nógv, til ber at fáa burtur úr so lítlum, siga tær báðar lesandi jenturnar Anette og Ann Helen. Longu nú eru tær á einum máli um, at ansingin í Føroyum er nógv frælsari enn í Noreg.

Í summar verður høvuðsuppgávan hjá norsku námsfrøðingunum latin inn, og spennandi verður at lesa, halda tey í Útistovu, ið sjálvandi fáa eitt eintak.



*Gunnar tekst við at vaska rekatrø, ið skulu nýtast til myndir, ið børnini skulu gera.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Jákup og Gunnar vóru fúsir at fara upp í træið, tá myndamaðurin bað teir. Jákup (í erva) er 6 ár, og Gunnar er 7. Báðir hava reyðar kjálkar.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

2 ´arin

Leygardagur 29. januar 2000



**Gjørt dreingjadreym til veruleika**

*Síða 3*

# Bóndans ríkið

Hóast Hanus bóndi ræður yvir veldugum víddum á garði sínum í Uppistovu, hevur hann bæði síni bóndabein væl fest í døkku hagamoldini í Norðradali. Gerðandisdagurin er endamálið við tilveruni



*Mynd: Jens Kristian Vang*